## Bøgesvang á Gjaranesi árið út

Tá Henning Bøgesvang varð fyribils settur sum sóknarprestur frá Sjóvar prestagjaldi fra1. mars, var ætlanin at hann skuldi røkja starvið fram til 31. marst. Í samráð við kirkjuráðini verður starvstíðin hjá Henningi sum sóknarprestir í Sjóvar prestagjaldi longd hetta árið út, upplýsir bispur á heimasíðuni HYPERLINK "http://www.folkakirkjan.for" www.folkakirkjan.for



## Nógv móra á Suðurlandi

Í gjár var nógv móra at síggja í Skaftá í Skaftárdali á Suðurlandinum í Íslandi. Hesa tíðina eru ofta nógv fólk í summarhúsum í Skaftárdali. Løgreglan heitti sunnudagin á fólkini um at fara úr dalinum av ótta fyri, at Skaftá skuldi fara yvir áarbakkarnar. Tí kemur móran inn á vegirnar, so verður ikki koyrandi í Skaftádali Tíðliga í gjár varnaðust fólk nógvu móruna í ánni, og tað versnaði, sum dagurin leið. Áin vaks skjótt, og móti kvøldi var vatnstandurin vaksin við meira enn einum metri, Skaftá er jøkulsá, sum kemur undan Skaftárjøkli. Tað fréttist úr Íslandi í gjárkvøldið, at áin nú er reinari aftur, tí verður mett, at vatnstandurin fer at minka seinni í kvøld, skrivar joanisnielsen.fo.

# Heini og Páll vilja skerja við 20 prosentum





*Teir mæla til størsta niðurskurðin í fiskidøgum – heili 20% í øllum veiðibólkum*

**Teir, sum leggja upp til størstu skerjingina í fiskidøgum, eru Páll á Reynatúgvu og Heini O. Heinesen, sum mæla til niðurskurð upp á 20% í øllum skipabólkum**

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Floksfelagarnir hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum í vinnunevndini, Páll á Reynatúgvu og Heini O. Heinesen, eru teir, sum mæla til størstu skerjingina av fiskidøgum fyri komandi fiskiár.

Sum annar av minnilutunum í vinnunevndini mæla teir báðir til, at fiskidagarnir í øllum skipabólkum verða skornir við heili 20%, ið er sama tal, sum landsstýrismaðurin Tórbjørn Jacobsen mælti til at skerja partrolaraflotan við.

At Páll fór at mæla til slíkar skerjingar, var kanska ikki so óvæntað, men fáur mundi rokna við, at Heini O. Heinesen, sum er valdur í størsta útróðrarøki og línuøki í landinum, fór at taka so rívan til í sínum tilmæli til løgtingið.

### At saðla um

Báðir ásanna teir, at toskaog hýsustovnurin eru sera illa fyri, meðan upsastovnurin hinvegin er rímiliga væl fyri.

- Landsstýrismaðurin ger greitt í sínum uppskoti, at skilabest er at saðla um í rikna fiskivinnupolitikkinum – skilt á tann hátt, at vit í framtíðini eiga at lurta meira eftir lívfrøðiligu ráðgevingini, tá fiskidagar verða ásettir á hvørjum ári.

Páll og Heini siga seg í stóran mun vera samdar við sjónarmiðini hjá egnum landsstýrismanni.

- Vit eru eisini sannførdir um, at krøvini í framtíðini fara at hava við sær, at ikki slepst undan hesi tilgongd frameftir. Hóast vit í stóran mun eru samdir við uppskotinum hjá landsstýrismanninum, halda vit, at hann hevur tikið í so rívan til.

Teir halda, at ein skiftistíð eigur at geva vinnuni og samfelagnum eitt skotbrá ella eina skilagóða venjingartíð til nýggju leiðina.

- Tí mæla vit til, at nakað av ferðini verður tikið úr tilgongdini í mun til uppskotið hjá landsstýrismanninum, sum tað fyriliggur, sigur Páll á Reynatúgvu og Heini O. Heinesen, sum mæla til eina skerjing av fiskidøgum í øllum veiðibólkum upp á 20%.

Umframt viðmerkingarnar, sum Páll og Heini hava í felag, hevur løgtingsmaðurin í Norðoyggjum eisini gjørt sínar egnu viðmerkingar í vinnunevndini.

Heini O. Heinesen ásannar, at lógin um vinnuligan fiskiskap er illa umsitin, síðan hon kom í gildi fyri 12 árum síðan.

- Vit eru í ferð við at saga greinina av, sum øll fiskivinnan hvílir á, sigur hann.

# Jóhan Dahl mælir til 10 prosent

**Formaðurin í vinnunevndini, Jóhan Dahl, tekur meira rívan til enn hinir fýra í andstøðuni gera saman við Gerhardi Lognberg. Hann mælir nevniliga til eina skerjing í fiskidøgum upp á 10 í øllum bólkum**

FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Andstøðan á tingi eigur við formanninum Jóhan Dahl meirilutan í vinnunevnd løgtingsins. Kortini hevur formaðurin sum annar av minnilutunum í nevndini sítt egna uppskot um fiskidagar fyri komandi fiskiár, har hann mælir til, at allir veiðibólkar verða skornir við 10%.

Jóhan Dahl tekur heldur ikki undir við landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Tórbirni Jacobsen, sum upp á forhond ætlaði at taka 5.000 dagar frá bólki 5 – umframt, at hann hevur skotið upp á skerja alla húkaveiði og harvið eisini útróðrarflotan við 50%.

- Eg meti, at støðan í fiskivinnuni av sær sjálvum fer at hava við sær eina minking av veiðini á landleiðini, og at veiðitrýstið tí sum heild fer at minka meira, enn skerjingin av døgum viðførir.



*Jóhan Dahl mælir sum ein av minnilutunum í vinnunevndini til, at allir skipabólkar í komandi fiskiári verða skerdir við 10% í fiskidøgum*

Jóhan Dahl mælir í sínum uppskoti til, at Føroyabanki verður totalfriðaður komandi fiskiár – við somu knattastøðum, sum vóru galdandi fyri verandi fiskiár. Hann heldur eisini, at neyvar stovnsmetingar mugu gerast av bankanum komandi fiskiár.

### Sami leistur

- Fyri at kunna áseta eitt fiskidagatal fyri botnfiskaflotan undir Føroyum, sum er burðardygt og røkkur veiðisetninginum um, at í mesta lagi 33% av hvørjum stovni í tali verður fiskað á hvørjum ári, má fiskidagatalið roknast út eftir sama leisti, sum tá ið dagarnir á fyrsta sinni vórðu ásettir í 1996.

Jóhan Dahl heldur, at Fiskirannsóknarstovan eigur at rokna út fiskidagatalið fyri hvønn skipabólk eftir sama frymli, sum varð nýttur í 1995-1996, og síðan skal rætta dagatalið finnast, sum røkkur veiðisetninginum.

- Til hetta verða nýttar tær uppgerðir av veiði og nýtslu av døgum upp á hvønn skipabólk, sum Fiskiveiðieftirlitið almannakunnger.

Minnilutin heldur, at Fiskirannsóknarstovan eisini eigur at gera metingar um, hvussu stongdu leiðirnar undir Føroyum og ásetingarnar um meskavídd ávirka, hvussu nógv verður fiskað av ymisku fiskastovnunum.

- Fyri at røkka hesum setningi, er neyðugt, at Fiskirannsóknarstovan nýtir neyðuga orku til tað arbeiði, sum er neyðugt at gera.

Jóhan Dahl vísir til staðfestingina um, at 33%-reglan er burðardygg og í samljóði við fyrivarnisregluna.

- Hetta er sera týdningarmikið fyri umdømið hjá føroyskari fiskivinnuumsiting, og tí er neyðugt at fáa skipanina tillagaða soleiðis, at útrokning av veiðievni verður samsvarandi hesum.

### Økt eftirlit

Løgtingsmaðurin heldur, at neyðugt er eisini at økja um eftirlitið hjá Fiskiveiðieftirlitinum, og í hesum sambandi nevnir hann serliga eftirlitið við hjáveiði hjá uppisjóvarflotanum og fremmandum skipum í føroyskum sjógvi annars.

- Samstarvið millum Fiskiveiðieftirlitið og Fiskirannsóknarstovuna eigur at verða styrkt, og neyðug játtan eigur í hesum sambandi at verða fingin til vega, sigur Jóhan Dahl, løgtingsmaður og formaður í vinnunevnd løgtingsins.



*- Samstarvið millum Fiskirannsóknarstovuna (mynd) og Fiskiveiðieftirlitið eigur at verða styrkt, heldur Jóhan Dahl, formaður í vinnunevnd løgtingsins*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*